Tíðindabrævið
# Hugin & Munin
Granskingarverkætlanin fyri Økismenning

Nr. 1 mars 2000 1. árg.

# Í gongd

*Hølini, ið granskingarverkætlanin húsast í eru ljós og rúmlig. Ætlandi verður bygningurin umvældur uttan næsta ár.*



Fyrstu spírarnir til Granskingarverkætlanina fyri Økismenning vórðu sáddir á sumri 1996 - 97, og loksins er hon farin í gongd. Ætlanin hjá fyrireikarunum hevur alla tíðina verið at seta á stovn ein varandi granskingardepil, men eftir drúgva telving eru UMMS og fyrireikararnir komnir á samt um, at í fyrsta umfari verður talan um eina verkætlan. Verkætlanin gongur til og við 2002, og tá verður ein eftirmeting gjørd, og grundað á eftirmetingina verður avgerð tikin um, hvussu granskingin skal halda fram.

Granskingarverkætlanin verður partvís fíggjað við játtan á løgtingsins fíggjarlóg. Veitingin fer av játtanini til granskingarverkætlaninir. Harumframt hevur staðið øllum kommunum í boði at vera við í verkætlanini. Tær kommunur, ið hava tikið av, rinda 35 kr. fyri íbúgvan, og samlaða kommunufíggingin er omanfyri 500.000 kr.

Granskingarverkætlanin fyri Økismenning húsast á gomlu politistøðini Klaksvík. Klaksvíkar kommuna keypti bygningin frá løgmálaráðnum í fjør fyri góðar 400.000 kr. Bygningurin er í tveimum hæddum, hvør uppá uml. 120 fermetrar, umframt kjallara. Í fjørheyst var niðara hæddin gjørd í stand, og avgjørt er at seta ovaru hæddina í stand í ár. Næsta ár er ætlanin at skifta klæðning og at gera kjallaran til bókasavn v.m. Tað eru Fuglø Arkitektar, ið standa fyri umbygginginí.

Umframt hølini í Klaksvík hevur granskingarverkætlanin hølir í Suðuroynni við vælvild frá Vágs kommunu, og har hava tveir av granskarunum teirra dagliga arbeiðspláss.

Seinni í ár – fyri summarferiuna – verður skipað fyri einum degi, har høvi verður hjá almenninginum at síggja hølini , har verkætlanin húsast og kunna seg um verkætlanina.

# Stýrið

Granskingarverkætlanin fyri Økismenning er – sum navnið sigur – skipað sum ein verkætlan. Sett er eitt stýrið, ið hevur endaligu fíggjarligu ábyrgdina av verkætlanini og sum skal síggja til, at játtanin verður nýtt í samsvari við endamálið. Limirnir eru fimm í tali, og landsstýrismaðurin í granskingarmálum tilnevnir teir allar, ein einvíst og fýra eftir innstilling frá starvsfólkunum á Granskingarverkætlanini.

Landsstýrismaðurin hevur tilnevnt Maluna Marnersdóttir, rektara á Fróðskaparsetri Føroya, beinleiðis. Tey fýra, ið eru tilnevnd eftir innstilling, eru Svein Jentoft, professari á universitetinum í Tromsø, Jógvan Mørkøre, adjunktur á Søgu- & Samfelagsdeildini, Barbara á Tjaldrafløtti, fulltrúi, og Egil Olsen, virkisleiðari. Stýrið, ið hevði sín fyrsta fund 17. januar, er valt fyri alt tíðarskeiðið, ið verkætlanin stendur við, t.e. til og við 2002. Stýrið skipar seg sjálvt, og á fyrsta fundinum var Malan Marnersdóttir vald til formann.

*Malan Marnerdóttir er formaður í stýrinum, ið skal fylgja við virkseminum hjá Granskingarverkætlanini fyri Økismenning*



# Grannastevna

**Helga Hjørvar, stjóri í Norðurlandahúsinum, skrivar**

# Menning í altjóða meldri

Norðurlendsku samfeløgini eru grundað á virðir, ið eru nær tengd at søguni, náttúruni og vinnulívinum. Tey eru eisini eyðkend við eini búseting í fevnir um sera kørg og ólagalig øki, og tey eru eyðkend av spjaddari búseting, tó at hvørt plássi sær kann vera ymiskt til tættleika. Hetta hevur ávirkað okkara mentan, tí mentan speglar okkara lív og liviumstøður. Rættiliga fittur partur av fólkinum er úthorvin og hevur tørv á og hug til at brúka orku uppá avbjóðingar í nærumhvørvinum. Fólk eru virkin, tí tey sjálvi eru noydd at fáa til vega tær upplivingar og teir ágóðar annars, tey ynskja at njóta, meðan spurningurin um fíggjarligan vinning kemur í aðru røð.

Nú standa broytingar í mentanini fyri framman, tí altjóða mentanin pikkar á dyrnar í øllum londum og sostatt eisini ein øðrvísi mentanarbygnaður: Meiri samanstúvað búseting, fremmandagerðing, t.v.s. at okkum er ikki greitt, hvaðani maturin, ið vit eta kemur, og eins og minni vitan um søguligu røtur okkara hongur uppivið hesi gongdini. Vit vera *brúkarar* av mentan heldur enn *skaparar;* karmar verða lagdir um sosialu funktiónirnar og búskaparligu virðini eru fremst í huga.

Hetta lívsmynstur verður borðreitt fyri okkum av altjóða undirhaldsídnaðinum í filmum, sjónvarpssendingum og tónleiki. Rásarúmið hjá tí einstaka borgaranum, tá ið tað kemur til skapan, verður sostatt alt meiri avmarkað til uppliving heldur enn sjálvur at skapa. Vilja vit varðveita okkara mentannareyðkenni og samstundis vera við í menningini, so liggur ein tung uppgáva fyri framman.

Royndir verða gjørdar at taka við avbjóðingini og ymisk áhugaverd tiltøk verða roynd. Eg fari at halda meg til tað mentannarliga. Tað er eyðgivið, at mentannarliga áhugarørslan hevur eina týðandi funktión í nærumhvørvinum, tí hon gevur tí einstaka møguleika fyri at koma eftir og menna hansara skapandi evni. Vit mugu viðurkenna, at í einum framkomnum vælferðarsamfelag hava vit tørv á fleiri avbjóðingum, enn tá ið stríðið fyri at yvirliva var so krevjandi, at stundir vóru ikki til annað.

Týdningurin av einum stað nýtist ikki at hava samband við talið av fólki, ið har býr, men heldur hevur hann samband við teir setningar, tær hugsjónir og tey uppskot, hesir einstaklingarnir hava innan politikk, mentan, útbúgving og/ella vinnulív. Nevnast kann dømið úr bókmentunum, har William Heinesen hevur umrøtt Føroyar sum heimsins nalva í alhavinum og rúmdini.

Í Norðanlondum eru stig tikin til samstarv millum ymisk øki, og nógv av samstarvinum á mentannarliga økinum hevur borið góða frukt. Mangan er tað lættari hjá einum føroyingi ella íslendingi at samskifta við fólk úr Jútlandi í Danmark og við fólk úr norðaru pørtunum í Noregi, Svøríki og Finnlandi enn við fólk úr høvuðsstøðunum í nevndu londum. Økissjónleikarhús eru víðahvar í Norðurlondum, og tey samstarva í fleiri førum, og vinarbýarskipanin tykist eisini at fremja virkið samstarv. Eisini verður samstarvað millum amt, t.d. samstarva Värmland í Svøríki og Hedmark Fylke í Noregi innan bæði mentan og vinnulív, og á Vestmannaoyggjunum er gjørd eitt norðurlendskt høggmyndasavn, bert fyri at nevna nakað av tí virksemi, ið fer fram innan og millum øki. Søguligar hendingar verða framførdar uttandura, har tær fóru fram í veruleikanum, skeið verða hildin og festivalar fyriskipaðir í norðurlendskum høpi, so fólk hava høvi til at uppliva náttúruna eins væl og mentanina um eina leið.

Føroyar hava ein týðandi leiklut tá ið tað kemur til at varðveita søguliga- og mentunarliga kjølfestið, eftirsum Føroyar í størri mun enn onnur lond hava varðveitt javnvágina millum høvuðsstaðin og útjaðaran. Føroyingar hava í høvuðsstaði sínum varðveitt og ment føroysku mentanina og samstundis varðveitt beinleiðis sambandið við hana sum gerandismentan hjá fólkinum.

Lokala áhugamentanin í Føroyum er sterk, men tá ið vit hava í huga tær avbjóðingar, ið koma uttaneftir, so mugu vit viðganga, at tað vantar eitt kontaktnet. Tað er ikki rætt at rokna við, at tey, ið eru virkin í lokala mentannarlívinum, eisini skulu taka á seg ábyrgdina av hesu uppgávuni. Tað má roknast fyri at vera ein kommunal uppgáva, og í ávísum førum taka kommunur eisini hesa uppgávuna upp á seg. Tað eigur eisini at vera áhugin – og tískil eisini uppgávan – hjá vinnulívinum at síggja til, at fólk verður búgvandi, og tí kundi ein hugsað sær, at vinnulívið heldur enn gjarna fíggjaði nøkur størri, lokal mentannarlig tiltøk.

Tað er meira spennandi at vera virkin luttakari enn óvirkin áskoðari, og tí má tað haldast at vera av alstórum týdningi, at stig nú eru tikin til at seta á stovn ein granskingardepil innan økismenning. Hann kann savna inn og leggja fram vitan innan hetta øki fyri almenningin, - vitan, ið kann vera týðandi grundarlag undir orðaskiftinum um, hvussu tað framhaldandi kann verða liviligt kring landið samstundis sum mentunnarligi arvurin verður varðveittur sum virkin partur í menningini.

Tað er mín vón, at virksemið hjá granskingardeplinum kann eggja til orðaskifti. Ikki bert í hvørjum øki sær, men eisini *ímillum* øki í Føroyum. Eisini átti tað at veri upplagt at fingið í lag orðaskifti millum føroysk og *útlendsk* øki, ið dragast við somu trupulleikar, men sum samstundis vilja virka skapandi til tess at brúka tað lokala tilfeingið í stríðnum fyri einum liviligum nærumhvørvi.

*Helga Hjørvar*



Mynd: Miðil

# Fiskastovnar og lokalsamfeløg

Í januar mánaði helt norski samfelagsfrøðingurin Svein Jentoft, Tromsø, tveir fyrilestrar. Fyrri fyrilesturin, hildin í Nóatúni 17. januar, hevði heitið ”Samfunnsvitenskapelig forskning på marin ressursforvaltning”. Fiskiveiðufyrisiting er lógir og reglur, ið miða eftir at fáa tey, ið veiða, at bera seg at á ávísan, ynskiligan hátt fyri at fiskastovnarnir verða gagnnýttir sum best; verða atburðarreglurnar brotnar, so hevur skipanin reglur fyri, hvussu brot á reglurnar skulu sektast.

Tað, sum samfelagsvísindini fáast við, er júst spurningurin um atburð og samfelagsliga regulering av honum. Tí er tað marghháttligt, at samfelagsvísindini at kalla als ongan leiklut hava í sambandi við fiskiveiðufyrisiting. Á vísindaligu síðuni eru tað stórt sæð bert lívfrøðingar, ið eru uppií, tá ið ásetingar um fiskiveiðureglur skulu gerast.

Svein Jentoft helt, at samfelagsfrøðingar hava vitan, ið kann fjøltátta orðaskiftið um, hvussu fiskiveiðan eigur at verða reglerað og hví. Tískil áttu samfelagsfrøðingar eisini at havt eitt pláss í teimum nevndum o.ø., ið áseta ella gera tilmæli um hesi viðurskifti.

Hann legði síni egnu grundsjónarmið fram um fiskiveiðuregulering, og tey gingu fyri ein part aftur í seinna fyrilestrinum.

Hesin fyrilesturin hevði heitið ”Lokalsamfunnet i fiskeriforvaltningen” og varð hildin á Tekniska Skúla í Klaksvík kvøldið eftir. Lívfør lokalsamfeløg eru treytað av fiskastovnum, ið eru væl fyri.



*Svein Jentoft, Tromsø*

Hetta er ein upplagdur sannleiki, ið ikki er neyðugt at grundgeva fyri. Í staðin vildi Svein Jentoft grundgeva fyri tí øvugta: Sterk, lívfør lokalsamfeløg eru *orsøkin* til at fiskastovnar eru væl fyri!

Fríi fiskiskapurin hevur elvt til tað, sum rópt hevur verið ’the tragedy of common’ ella sorgarleikur almenningsins. Loysnin hjá búskaparfrøðingum hevur verið ’rættindi’ og ’marknaður’. T.v.s., at veiðufør skulu hava áví s – og ikki óavmarkað – veiðurættindi; samstundis skulu hesi rættindi kunna keypast og seljast. Rættindini hava sostatt ein prís, og tað eigur - sambært búskaparfrøðingunum - at hava við sær, at stovnarnir ikki vera ovveiddir og at teir verða gagnnýttir við minst møguligari orku.

Svein Jentoft segði, at kvotuskipanir høvdu víst seg at hava við sær júst tað, ið fría skipanin varð kritiserað fyri: Vinningssøkjandi búskaparligar eindir, ið bara hugsaðu um sjálvan seg og ikki samfelagsheildina. Eisini hevur kvotuskipanin víst seg at hava við sær størri skipaeindir og sostatt eisini, at fiskivinnan loysnar alt meiri frá lokala tilknýtinum.

Tá ið ein hvør er sær sjálvum næstur, so viknar eisini samhaldsfestið í (lokal)samfelagnum. Tey, ið eru virkin í fiskivinnuni, verða verri og verri før fyri at samvirka fyri at varðveita fiskastovnarnar til gagns fyri lokalsamfelagið.

Avleiðingin er, at tað ikki er felagsskapurin, men alt størri alment eftirlit, ið skal til fyri at forða fyri ovveiðu.

## ”SMÁRIT”

**‘Smárit’ – tað er felagsheitið fyri eina av útgávunum hjá Granskingarverkætlanini fyri Økismenning. Hetta er tað, sum á enskum verður rópt ‘occasional paper’, vanliga ikki stórt í vavi og ikki altíð so ‘liðugt’.**

**Innihaldið verður fyrilestrar, greinir o.l. Fyrsta ‘Smárit’ er útkomið. Tað ber heitið ‘Lokalsamfunnet i fiskeriforvaltningen’. Hetta er prentað útgáva av fyrilestri, ið Svein Jentoft, professari, helt á Tekniska Skúla í Klaksvík 18. januar í ár.**

**Smárit, ið kostar 20 kr., fæst við at venda sær til Granskingarverkætlanina fyri Økismenning; adressa v.m. er á baksíðuni.**



# Kanadiskur leiðari

Leiðarin á Granskingarverkætlanini fyri Økismenning eitur Richard Apostle. Hann er 55 ára gamal kanadiumaður og útbúgvin samfelagsfrøðingur. Richard Apostle, ið hevur sáttmála til og við 2002, starvast annars sum professari á Dalhousie University í Halifax, Nova Scotia. Hann hevur í fleiri ár granskað í økismenning innan samfeløg, ið serliga grundað sína tilveru á náttúrutilfeingi. Holli førleikin og drúgvu royndirnar hjá Richardi Apostle hava verið avgerandi fyri, at heitt varð á hann um at lynna verkætlanina.



Tilvildarlig mynd/Miðil

# „Djarvt tiltak ...!“

*Samfelagsgransking viðger viðurskifti, ið flestu hava vitan og meiningar um. Serliga granskarar í smáum samfeløgum kunnu koma í andglettin*

NORDREGIO er norðurlendskur granskingar- og ráðgevingarstovnur. Í serfrøðingaráðnum sita tveir føroyingar, Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur, og Rani Nolsøe, havnarstjóri í Klaksvík. Eftir áheitan frá NORDREGIO greiddi Rani Nolsøe frá Granskingarverkætlanini fyri Økismenning á fundi í Stockhólmi í februar.

Framløgan vakti ans, og Hallgeir Aalbu, stjóri á NORDREGIO, var ein teirra, ið var til staðar undir framløguna. Hann heldur tiltakið vera bæði áhugavert og spennandi.

- Eg haldi, at tað er einastandandi og djarvt, at man í einum so lítlum samfelag útsetir seg fyri tí vága, sum samfelagsgransking í roynd og veru er, sigur NORDREGIO-stjórin, ið man vita, hvat hann tosar um, tí í sjey ár var hann stjóri á granskingarstovninum í Bodø.

Hallgeir Aalbu heldur, at tað er umráðandi at útvega vitan um eins egna samfelag á egnum máli. Samfelagsgransking er – eins og onnur gransking - gagnlig fyri samfelagið, tí hon útvegar part av teirri vitan, ið framtíðar menning byggir á. Harumframt er granskingin ein týdningarmikil partur av demokratisku tilgongdini: Tá ið gransking er best, so elvir hon til orðaskifti, ikki minst samfelagsgransking, tí hon viðgerð viðurskifti, ið flestu hava eina meining um.

- Og tað hendir seg meiri enn so, at granskingin ber í sær vitan, ið fólk ikki *vilja* kennast við. Og tá kann orðaskiftið verða so mikið harðligt, at granskararnir sjálvir koma í andglettin, sigur Hallgeir Aalbu.

NORDREGIO-stjórin vónar, at Granskingarverkætlanin fyri Økismenning fær høvi til at samstarva í NORDREGIO-høpi í framtíðini, eitt nú í samanberandi lýsingum av norðurlendskum lokalsamfeløgum.

# Hvat verður granskað?

Fyrstu trý árini standa trý høvuðsevni á skránni hjá Granskingarverkætlanini fyri Økismenning. Í ár er tað vinnulívsmenning í stendur ovast á breddanum. Spurningurin, ið verkætlanin setur sær, er, hvussu vit kunnu fáa ein meiri fjøltáttaðan búskap. Við øðrum orðum: Hvussu kunnu vit menna alternativini til fiskivinnuna: alivinnuna, ferðavinnuna, kunningartøkni, smáídnað o.s.frv.

Komandi ár er høvuðsevnið ‘kommunur og bygdarsamfeløg’. Hendan granskingin umfatar partvís spurningin um politisku skipanina í kommunuhøpi, t.v.s. allan spurningin um avgerðarrætt og ábyrgd kommunanna. Granskingin umfatar eisini spurningin um teir tættir, ið krevjast til tess at skapa trygd og trivnað í einum bygdarsamfelag: Skúli, heilsurøkt, eldrarøkt, barnaansing, frítíðarmøguleikar o.s.frv.

2002 er høvuðsevnið ‘ungdómur og útjaðarin’. Tað er væl kent fyribrigdi um allan heim, at ungdómurin er tann parturin av fólkinum, ið serliga flytur frá útjaðaranum og til størru plássini. Er hetta óundansleppandi? Ella kann nakað gerast fyri at fáa ungdómin at støðast og í besta føri at flyta aftur?



## Hugin & Munin

Fýra ferðir um árið er ætlan okkara at geva út eitt tíðindabræv, ið umrøður viðurskifti viðvíkjandi økismenning. Endamálið er at birta uppundir orðaskiftið um, hvussu tað kann gerast so liviligt sum til ber kring landið. Vit fara at leggja okkum eftir at greiða frá ymiskum royndum í øðrum londum, sum kunnu vera viðkomandi í føroyska orðaskiftinum, og í hvørjum blað verður kjakgrein um økismenning.

Hetta blaðið snýr seg í stóran mun um verkætlanina sjálva, og er tískil øðrvísi enn tey komandi. Blaðið verður sent til øll áhugað, og kann fáast við at venda sær til Granskingarverkætlanina; adressa v.m. sí niðast á síðuni.

Navnið spillir ongan, og vit hava valt at kalla blaðið Hugin & Munin eftir ravnum Óðins, ið flugu í eystur og vestur til tess at kunna Óðin um, hvat fyrifórst kring um í landinum.

Útgevari:
**Granskingarverkætlanin fyri Økismenning**
Jústagøta 1
**Postadressa:**
Postboks 159
700 Klaksvík
Tlf. 457744 & Fax 457743
Suðuroy: Tlf. 37 44 77
E-postur: region@region.fo
Heimasíða: www.region.fo
**Ábyrgd:**
Ólavur Waag Høgnesen
**Umbróting:**
Ólavur Waag Høgnesen
**Prent:**
Hestprent